arbeiðnum var at verða eitt slag av einum sjúkrahúspresti. Jóhan Petur fekk nógvar góðar samrøður við afrikonsku sjúklingarnir. Men nógvir sjúklingar høvdu upplivað ræðuleikar undir drúgva borgarakrígnum í Liberia.




*Jóhan Petur vitjar sjúklingar á sjúkrahúsinum umborð á skipinum*

## Misti 9 systkin

- Eg minnist serliga ein ungan 21 ára gamlan mann, sum eitur Jacob. Upprunaliga vóru tey 12 systkin, men tað eru bara 3 av teimum eftir á lívi. Hini 9 doyðu undir borgarakrígnum, ella doyðu í hungri. Jacob greiddi frá beiggja sínum, sum var dripin. Hesin hevði eina føðingardagsveitslu, sum tey hildu uttanfyri smáttuna í heimbygdini. So skuldi Jacob líka fara inn eftir nøkrum drykkivørum. Tá hann kemur út aftur eru gestirnir burtur, og tá stóðu menn frá uppreistrarherliðunum uttanfyri smáttuna. Uppreistrarmennirnir tóku sínar stóru machettuknívar fram, og høgdu beinini og armarnar av beiggjanum, sum blæddi til deyðis. Tað er skakandi at hoyra slíkar søgur. Jacob slapp til rýmingar, og mamma hansara leitaði leingi eftir honum. Men aftaná tvey ár funnu tey hvønn annan, og vóru tey sjálvandi ovurfegin. Til tíðir kundi ein síggja á andlitinum hjá Jacob, at hann píndist av hesi ræðuligu upplivingini.

## Nýggja nøs

Jóhan Petur fekk eisini ein vin, sum eitur Joseph Mark. Joseph Mark misti nøsina hjá sær, tá hann var smádrongur. Ein av hinum konunum hjá pápanum tók lítla dreingin til ein heksadoktara, sum blásti okkurt gjøgnum nøsini, so Joseph Mark misti nøsina. Kortini bleiv Joseph Mark giftur, og eigur hann tvey børn, og er rættiliga ríkur, mett við onnur í Liberia. Hann átti nógv húsdjór, men tann eina dagin høvdu menn frá uppreistrarherinum dripið øll húsdjórini hjá honum. Saman við familjuni mátti hann fjala seg í buskalendinum í 3 mánaðir. Tey flýggjaðu so víðari til grannalandið, Fílabeinstrondina. Hóast nógva mótgongd í lívinum, so var Joseph Mark ein ógvuliga takksamur maður, sum altíð segði takk, og takkaði Gudi. Hann tók ikki nakað fyri givið. Umborð fekk hann eina skurðviðgerð, har hann fekk eina eftirgjørda nøs, og tað var Joseph Mark ógvuliga takksamur fyri.

## Ymiskar skurðviðgerðir

Ymiskar skurðviðgerðir verða gjørdar umborð. Hjá nógvum í Vestur-Afrika er opið millum nøsina og yvirvørrina, og fremja læknirnir tá eina skurðviðgerð, sum nevnist »Haru-skar«, sum bøtir væl uppá hetta. Summi hava eisini ein »Opnan Himmal«, og verða tey eisini løgd undir skurð. Nógv verða eisini skorin fyri »grástær«, og nógvir svullir verða eisini skurðviðgjørdir. Ein tann kendasta tænastan, sum Mercy Ships ger, er at skurðviðgerða gentur, sum verða giftar 12-13 ára gamlar. Hesar kvinnur eru fyri tí vanlagnu, at tað kemur hol á bløðrina, tí teir eiga børn í so ungum árum. Tær klára ikki at halda uppá vatnið, og verða útstoyttar av samfelagnum. Umborð eru serlæknar, sum seyma bløðrina hjá hesum kvinnum aftur, og er talan um eina sera kompliseraða skurðviðgerð. Viðhvørt mugu tvær skurðviðgerðir til. Tá ein skurðviðgerð er væleydnað verður ein serlig seromoni hildin umborð á skipinum fyri teimum ungu kvinnunum, sum fáa ein serligan kjóla, sum gávu. Hesar ungu kvinnurnar eru ovurfegnir um at hava fingið eitt nýtt lív, og at tær nú kunnu sleppa inn aftur í samfelagið, sum tær á sinni vóru stoyttar út frá.




*Alt er øðrvísi í Afrika, eisini handlarnir í Ghana*

## Nógvar upplivingar

Jóhan Petur fór eisini í land, og fór hann saman við øðrum at vitja landsbygdir í Liberia og Ghana, og var tað ógvuliga forkunnugt og spennandi. Jóhan Petur hevur eisini upplivað, at skipið hevur havt spennandi og forkunnugar vitjanir. Leiðarin fyri Sameindu Tjóðir í Liberia, tann danska Ellen Margrethe Løj vitjaði umborð, og fall tað Jóhan Peturi í lut at vísa henni runt. Liberiski forsetin, Ellen Johnson Serleaf, og varaforsetin, Joseph Boakai hava eisini javnan vitjað umborð. Upplivingarnar hava verið nógvar, men fyri Jóhan Petur eru tær bestu løturnar, tá hann var saman við sjúklingunum, antin á sjúkrahúsinum umborð, ella í samtalu við tær á dekkinum. Hann hevur eisini fingið góðar vinir í nógvum ymiskum londum, og hevur hann nógv fólk hann kann vitja í nógvum ymiskum londum. Tað er spennandi og mennandi at liva í einum altjóða umhvørvi, og samstundis verða við til at hjálpa menniskjum, sum veruliga hava brúk fyri hjálp. Jóhan Petur kann viðmæla øðrum at fara við Mercy Ships. Hann svarar gjarna spurningum frá fólki um Mercy Ships á tlf.nr 510069 og á johanpetur@hotmail.com. Um tveir mánaðir fellir avgerðin, um Jóhan Petur aftur fer umborð á Africa Mercy, fyri at tæna Gudi og mannaættini í Vestur-Afrika.



*Jóhan Petur undirvísir børnum umborð á skipinum*




*Samstarvið og millum norðurlendingarnar umborð var sera gott*

**Hoyr samrøðuna við Jóhan Petur Johannesen á Rás2, fríggjadagin 23. januar kl. 11.10**

Sosialurin